# Todi í toppdysti



*Todi skal leika toppdyst í vikuskiftinum*

**Áhugin hjá Birmingham fyri FCK spælarum snýr seg fyrst og fremst um ungan miðvallara**

Nýklassikarin í Keypmannahavn er á skránni, tá áttanda umfarið í superliguni verður spælt í morgin. Todi Jónsson og FCK skulu út í Brøndby.

– Hjá okkum er sera týdningarmikið at fáa stig og helst at vinna, sigur Todi Jónsson, og tað er væl skiljandi. Brøndby hevur verið sera sannførandi fyrsta partin av kappingini. Um teir vinna á FCK í morgin, so verða teir tíggju stig frammanfyri. Hóast tað vera 25 umfør eftir í DM kappingini, so verður tað tungt at vinna so stóran mun innaftur.

Tá tað mikudagin gjørdist greitt, at FCK ikki skuldi spæla í UEFA Cup hóskvøldið fóru teir beinanvegin at fyrireika seg til landskappingardystin sunnudagin. Hetta verður annar og síðsti dysturin, at Niels Christian Holmstrøm fer at hava ábyrgdina. Tá FCK hóskvøldið í komandi viku fær vitjan av Obelic, verður tað nýggi venjarin, Hans Backe, sum fer at hava ábyrgdina.

### Birmingham sýnar miðvallara

Tað hevur í hesi vikuni ikki verið so nógv at hoyrt um áhugan hjá eingilska Birmingham fyri Toda Jónsson og øðrum FCK spælarum. Men í fyrradagin var aftur nýtt á heimasíðuni hjá Birmingham. Í FCK eru teir tættir sum tunnan, meðan teir í Onglandi eru meiri tíðindafróir.

Birmingham heimasíðan veit at siga, at nú eru teir serliga áhugaðir í at keypa unga miðvallaran Christian Poulsen úr FCK. Einki verður sagt um Toda Jónsson ella um aðrar spælarar. Sambært heimasíðuna, so krevur FCK at fáa 44–60 milliónir krónur fyri at sleppa unga manninum, og tað siga teir í Onglandi er ikki so nógv, at felagið hevur mist áhugan at samráðast um keyp.

Í FCK siga teir, at tað tann seinasta mánan hevur verið nógv at lesa um FCK á heimasíðuni hjá Birmingham. Teir hava ongar ítøkiligar viðmerkingar til eingilsku tíðindini.

Hini bæði føroysku feløgini í superliguni skulu eisini spæla landskappingardystir í morgin. Esbjerg skal spæla í Viborg, og OB fær vitjan av AB.

### Aftur ímóti B93

Nú er lutur kastaður um, hvørjir dystirnir vera í fjórða umfarinum í donsku steypakappingini, sum verður spælt komandi mikudag. Seks superligu lið vóru í hattinum, og talan verður um ein dyst ímillum tvey lið úr bestu deildini. Vejle fær vitjan av OB.

Seinasta vikuskifti tapti B93 3–2 á heimavølli ímóti Randers Freja. Komandi mikudag hittast feløgini hjá Øssuri Hansen og Atla Gregersen í steypakappingini. Dysturin verður aftur hesa ferð á Eysturbrúgv í Keypmannahavn.

Hvidovre skal spæla á heimavølli ímóti oddaliðnum í næstbestu deildini, Køge.

Í landskappingini hittast Brønshøj og B93 í dag. Í morgin fer Hvidovre at spæla í Randers.




# Jákup á Ullevål



*Jákup gleðir seg til at spæla á norska tjóðarleikvøllinum*

**Landsliðsmálverjin, sum ikki áður hevur spælt á norska tjóðarleikvøllinum, fer longu í dag til norska høvuðsstaðin**

Seinasta vikuskifti endurvann Jákup Mikkelsen plássið millum stólparnar á besta liðnum hjá Molde. Ta ferðina gekk tað væl, bæði hjá Jákupi og Molde.

Í morgin fær Jákup, sum ikki enn veit, hvussu tað verður hjá honum komandi kappingarár, ein nýggjan møguleika. Kappingarneytin til málverjuplássið er framvegis so mikið ryggskaddur, at hann ikki fer at venja fyrrenn í fyrsta lagið mánadagin. Tí er einki ivamál um, at tað verður Jákup, sum í morgin fer at verja málið hjá Molde.

Molde skal spæla á norska tjóðarleikvøllinum, Ullevål, í Oslo.

– Vit fara longu leygardagin suðureftir, sjálvt um dysturin ímóti Lyn ikki verður fyrrenn sunnudagin, sigur Jákup Mikkelsen, sum ongantíð áður hevur spælt á norska tjóðarleikvøllinum.

Annað vikuskifti fara teir ikki at spæla í landskappingini í Noregi, tí tá verður eitt umfar í steypakappingini á skránni.



50 ár á sama arbeiðsplássi:

# - Tá eg byrjaði, var ikki eingang ein roknimaskina



*- Tá eg byrjaði, var ikki eingangs ein roknimaskina, sigur Jósvein Djurhuus*

**Jósvein Djurhuus hevur starvast á posthúsinum í Vági, síðani hann 16 ára gamal fór úr skúlanum. Hann byrjaði 1. apríl í 1951 og hevur havt 50 ára starvsdag. Mánadagin hevur hann sín síðsta starvsdag, men hann er ikki bangin fyri at keða seg, nú hann fer úr starvi eftir trúgva og drúgva tænastu**

ARBEIÐI OG FRÍTÍÐ

*Dagfinn Olsen*

Tey eru ikki mong, ið starvast at kalla alt lív sítt á sama arbeiðsplássi. Jósvein Djurhuus er ein teirra, tí í 50 ár hevur hann starvast á posthúsinum í Vági. Mánadagin hevur hann sín síðsta arbeiðsdag, tí hann hevur frítíð til góða.

Mánadagur er sostatt síðsti dagur í røðini av arbeiðsdøgum og einum arbeiðslívi, ið fevnir yvir 50 ár — hálva øld á sama arbeiðsplássi.

Tað var 1. apríl í 1951, at Jósvein byrjaði á posthúsinum í Vági. Hetta var á gamla posthúsinum í Vági. Pápi hansara starvaðist á postkontórinum og tey búði í ovaru hæddini. Tá Jósvein fór úr skúlanum 16 ára gamal, byrjaði hann á posthúsinum.

### Gott arbeiðspláss

- Pápi hevði posthúsið, so tað kom av sær sjálvum, sigur Jósvein og leggur skemtiliga afturat, at hetta, at tey búðu á staðnum, var gott um morgnarnar, men eisini sera hent, tá postur kom á kvøldi.

- Tá vóru starvsfólkini í starvi uppá kontrakt. Seinni broyttust umstøðurnar og Postverkið bleiv yvirtikið og gjørdist føroyskt, sigur Jósevin, ið ikki dylir, at hann metir Postverkið at hava verið eitt gott arbeiðspláss.

- Tá var eingin banki í Vági, so vit gjørdu nógv av tí arbeiðinum. Útbetalingskontórið fekk pening til útgjald og eisini keypmenn fingu reiðan pening frá okkum, greiðir Jósvein frá.

Eitt ár hevur Jósvein tó verið burtur frá, um ein kann siga so. Í 1959 fór hann til Danmarkar at starvast á posthúsi í Ballerup í eitt ár. Hann kom aftur í 1960 og var hetta eitt ár, ið skuldi nýtast at fáa royndir.

- Tá var eg ungur og tá er alt so lætt, sigur Jósvein, ið vanliga verður róptur Jósvein á Posthúsinum.

### Broytingar

At starvast á posthúsi á bygd er ein serstøk støða at hava. Ein kemur at kenna flest øll fólk.

- Eg kenni nærum hvønn óvita, sigur Jósvein, ið ikki noktar, at tað er ein býarmynd, ið hvørvur, nú hann leggur frá sær.

Eftir so mong ár, hálva øld, í sama starvi, eru ikki smávegis broytingar farnar fram.

- Tá Einkarsølan kom og vit mistu spiritusið, mistu vit nógv arbeiði. Vit mistu nógv arbeiði, serliga til høgtíðirnar. Í dag eru færri inngjaldingar, tí hesum taka bankarnir sær mest av. Men viðvíkjandi pakkum er støðan hin sama, sigur Jósvein Djurhuus.

Men hóast sagt verður, at við teldupostinum er brævaskriving farin í søguna, so heldur Jósvein, at talið á brøvum er nakað tað sama, sum áður.

- Brøvini eru eisini á leið tey somu í tali. Kanska er heldur færri privatbrøv, tað kann vera, men hinvegin eru somikið fleiri rokningar, væl meira enn fyrr. Og so eru eisini lýsingarbløð og annað tílíkt, sigur Jósvein.

- At nógv er broytt, kann Jósvein bara ásanna.

- Tá eg byrjaði, var ikki eingang ein roknimaskina. Vit taldu saman við hond, sigur Jósvein, sum hevur upplivað alla gongdina frá 1951, fram til dagin í dag, nú teldurnar gera stóran part av arbeiðinum, men ikki er frítt, at hann hevur hug at halda, at villurnar eru ikki færri í dag.

### Gott at eiga seg sjálvan

Jósvein Djurhuus hevur, eftir hálva øld á posthúsinum, ikki trupult við at sleppa starvinum.

*Gleðir tú teg at fáa frí?*

- Nei, tað veit eg nú ikki, men tíðin er komin. Men tað verður gott at eiga seg sjálvan, eftir at hava arbeitt eitt heilt lív, sigur Jósvein.

- Fyrr høvdu vit enntá opið leygardagar til klokkan 17. Jólaaftan kundi tað eisini henda, at arbeitt varð seint, tí pakkar ella annað lá eftir, minnist Jósvein.

### Keðir seg ikki

Eingin vandi er fyri, at Jósvein nú fer at keða seg, ella at hann ikki veit, hvat hann skal fáa tíðina at ganga við. Hann hevur seyð, so hann fer ikki at keða seg.

- Mær dámar eisini væl at lesa, sigur Jósvein og váttar, at heilsan er góð — enn, í hvussu er, leggur hann afturat.

Nú tíðin meira er nakað, ið hann ræður yvir sjálvur, er ikki óhugsandi, at hann ætlar sær undir ymiskt, ið tíðin ikki hevur verið til áður.

- Eg ætli kanska at ferðast. Nú er møguleikin í hvussu er til hetta. Mær hevur altíð dámað væl at ferðast, men eg havi havt seyð, so tað skuldi passa við hesar ymsu tíðirnar, sigur Jósvein Djurhuus.

Mánadagin fer hann fyri seinastu ferð aftur um skivuna á posthúsinum í Vági. Og tað er soleiðis vágbingar kenna hann, Jósvein á Posthúsinum: Blíður og klárur at hjálpa, handan skivuna, og greiður og væl inni í arbeiðsgongdini, eftir hálva øld í trúgvari og drúgvari tænastu.



*Soleiðis kenna vágbingar og onnur vitjandi Jósvein Djurhuus; handan skivuna á posthúsinum, men mánadagin setir hann seg handan skivuna fyri seinastu ferð, eftir hálva øld á sama arbeiðsplássi*

*(Mynd: D. Olsen)*



*Uppá spurningin, um hann gleðir seg at fáa frí, eftir 50 ára tænastu, sigur Jósvein Djurhuus: - Nei, tað veit eg nú ikki, men tíðin er komin. Men tað verður gott at eiga seg sjálvan,eftir at hava arbeitt eitt heilt lív.*